# Uppskot:



*Soleiðis kundi nýggja ferjan til Nólsoyar sæð út. Men hon kostar einar 50 mió krónur, og til hetta er ikki peningur í løtuni*

# Nýggj ferja til ta grønu oynna

**- Nýggja Nólsoyarferjan skuldi kunna leggja um frá diesel til vetni, var eitt av uppskotunum hjá Bjarna Djurholm, sum bæði hevur verið landsstýrismaður og løgtingsmaður. Eitt av hansara áhugamálum er orka, umhvørvi og samferðsla**

FERÐASAMBAND
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Nólsoyarleiðin:** - Henda ætlanin hevði avgjørt verið í tráð við orkupolitikk okkara, sigur løgtingsmaðurin. – Og hon hevði eisini kunnað sett Føroyar og Nólsoynna á heimskortið!

Hetta var júst eitt av málunum, sum Bjarni Djurholm fyri nøkrum áðrum síðani arbeiddi við sum landsstýrismaður, - at gera Nólsoynna til eina grøna orkuoyggj, eins og hann ynskti at finna eina loysn á spurninginum um siglingina millum høvuðsstaðin og Nólsoy.

Í hesum sambandi arbeiddi Jarðfeingi, saman við StatoilHydro, Enercon, SEV og Tórshavnar Kommunu um at kanna teknisku og fíggjarligu møguleikarnar at nýta vind sum orkukeldu til bæði el, hita og vetni (les: hydrogen) í Nólsoy.

Ætlanin var at byggja eina skipan, har vindorkan varð javnað við vetnistøkni, so brúkarin fekk støðuga orkuveiting, eisini tá vindstilli var, vísti Bjarni Djurholm á, tá málið var frammi fyri nøkrum árum síðani.

Vetnistøknin er enn ikki handilsliga burðardygg, og kundi Nólsoyarætlanin tí ikki bert fíggjast við inntøkunum frá orkusøluni. Fyri at fáa verkætlanina gjøgnumførda var tí neyðugt, at Samtakið stuðlaði fíggjarliga.

Um verkætlanin eydnaðist, kundi sama skipan nýtast í størri mátistokki, bæði í Føroyum og uttanlands, tí elnetið verður ikki órógvað av óstøðugu vindorkuni. Nólsoyarverkætlanin kundi tí koma at standa sum ein fyrimynd í sambandi við burðardygga orkuframleiðslu. Ætlanin var at seta vindmyllur við tilsamans 1,8 MW mátti upp á Stongini og framleiða el beinleiðis til brúkaran, til vetnisframleiðslu og til eina hitagoymslu.

Orkan, ið skuldi goymast sum vetni skuldi nýtast, tá ov lítið var til av vindorku til at nøkta orkutørvin. Vetni kann, um ynskiligt, eisini nýtast sum brennievni til flutningsfør og arbeiðstól.

Í tí sambandi varð avrátt, at nýggja Nólsoyarferjan skuldi kunna leggja um frá diesel til vetni, tá vetnisskipanin var burðardygg.

### Á heimskortið

Íløgan til samlaðu skipanina í Nólsoy var mett til uml. 60 mió kr. Inntøkan frá orkusøluni var roknað við útgangsstøði í táverandi prísi á el og olju og var mett til 2,2 mió kr um árið, tá ið sæð verður burtur frá oljuavgjaldi og MVG.

Hendan inntøkan einsamøll kundi bert bera eina íløgu, ið var 25 til 30 mió kr. Um landið gav mvg-frítøku, hækkaði inntøkan frá orkusøluni úr 2,2 til 3,1 mio kr, og harvið hækkaði møguliga íløgan úr 30 til 40 mio kr.

Sostatt restaði nakað í, men um hinir partarnir í verkætlanini gjørdu sítt til at minka um kostnaðin varð væntað, at javnvág kundi fáast millum neyðugu íløguna og inntøkuna.

- Nólsoyarætlanin er í samsvar við orkupolitikk landsins, har miðað verður móti at minka um oljunýtsluna og økja um orkuframleiðsluna frá varandi orkukeldum, vísti tingmaðurin á.

Sum dømi kann nevnast, at skipanin við vetnis- og hitagoymslu í Nólsoy hevði minkað um innflutningin av olju við 300.000 litrum árliga og harvið minkað um $CO_2$ dálkingina við 800 tonsum um árið.

Tá Bjarni Djurholm reisti hetta málið sum munnligan fyrispurning á tingi, fekk hann greitt at vita, at landsstýrismaðurin í vinnumálum, Jóhan Dahl tók ikki undir við tí. Tí er enn einki avgjørt í hesum áhugaverda máli.

> *Neyvan man nakar vera í iva um, at best hevði verið við tveimum heilt nýggjum skipum til báðar farleiðirnar*



*- Skal Nólsoyggin mennast og bygdafólkið annars støðast, so er fyrsta fortreytin at nólsoyingar fáa nýggja ferju til flutning um fjørðin, sigur Bjarni Djurholm, tingmaður*



*- Vit hava í hesum umfarinum valt at troyta tey skipini sum eru í okkara flota í løtuni. Men tað kostar eisini pening at dagføra Rituna og Ternuna, sigur strandferðslustjórin, Bogi Mortensen*

# Sigla í seinasta lagi í summar

**Á Strandferðsluni arbeiða tey í hesum døgum av øllum alvi við at tryggja nólsoyingum, svínoyingum og fugloyingum betri skip til summarsiglingina**

SAMFERÐSLA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Nólsoy/Fugloy:** Gongst sum ætlað fáa nólsoyingar eitt annað og betri skip til siglingina í summar. Og tað sama kann fólkið í Svínoy og Fugloy gleða seg til.

Hetta er partur av ætlanini at dagføra siglingina á hesum báðum leiðunum. Og hetta er samstundis í tráð við játtanina til Strandferðsluna.

Neyvan man nakar vera í iva um, at best hevði verið við tveimum heilt nýggjum skipum til báðar farleiðirnar. Men játtan er altso ikki til hetta í hesum umfari.

Játtan varð einans til at bøta um verandi flota hjá Strandferðsluni, og tí verður tað so, at Ternan fer at sigla til Nólsoyar, meðan Ritan fer at sigla úr Hvannasundi til Fugloyar og Svínoyar (sí annars aðra grein her á síðuni).

### Ternan fyrst

Í hesum døgum eru menn í ferð við at rokna uppá tilboð uppá arbeiðið, at seta Ternuna í stand aftur til at røkja Nólsoyarleiðina.

Skipið hevur ligið við bryggju á Tvøroyri, og hevur verið nýtt sum eykaskip hjá Strandferðsluni. Men nú skulu rættiliga stórar umvælingar, dagføringar og eisini betringar gerast umborð.

Í farnu viku vóru menn umborð á Ternuni fyri at hyggja eftir umstøðunum, og sum skilst á strandferðslustjóranum, Boga Mortensen skulu hesi tilboðini vera inni seinni í hesi vikuni.

- Vit gera fyrst arbeiðið umborð á Ternuni, tí tað er nakað væl størri enn tað, sum gerast skal umborð á Rituni, sigur Bogi Mortensen við Sosialin.

Ætlanin hjá strandferðsluni er, at bæði skipini skulu verða klár til siglingina seinni í vár – í øllum førum, tá summarferðslan av álvara byrjar.